Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin

**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Matvøra má virkast undir skipaðum umstøðum

## *Oddagrein*

FØROYSKT neytakjøt, sum ikki er heilsufrøðiliga kannað, kann vera eitt vandamál fyri fólkaheilsuna, sigur landsdjóralæknin í eini samrøðu við Dimmalætting. Landsdjóralæknin ávarar landsmyndugleikarnar um at gera nakað við málið, tí hetta er brot á altjóða handilsreglur.

BARA helvtin av føroysku neytunum verður flett á sláturvirkinum hjá Meginfelag Búnaðarmanna í Hósvík. Sláturvirkið í Hósvík er tað einasta løggildaða sláturvirki í landinum. Tá bara annaðhvørt neyt verður flett í Hósvík, er tað tí, at bøndur og onnur, sum hava neyt, heldur fletta neytini sjálvi. Á henda hátt spara tey helst nakað av peningi. Neytini, sum ikki fáa kúluna fyri pannuna í Hósvík, verða flett í fjósum, í einum kjallara ella í onkrum bilskúri. Tað kann bæði vera hugnaligt, og eisini stuttligt. Serliga tá fleiri eru um tað, og skonkt verður. Hetta er ein partur av lívinum í nógvum plássum. Hesum kann eingin hava nakað ímóti. Í hvussu er ikki, um kjøtið ikki skal seljast.

ØÐRVÍSI er, tá talan er um kjøt til handilsvøru. Tá eigur minsta kravið at verða, at neytini verða flett á løggildum sláturvirki og at hetta er undir vanligum heilsufrøðiligum eftirliti. Annað kann ikki góðtakast. Tað mugu bæði bøndur og Vinnumálastýrið gera sær greitt.

FERÐ eftir ferð hoyra vit, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur ikki nóg stóra orku til at umsita tey heilsufrøðiligu krøv, sum reglur og lógir áseta. Tí arbeiðir Starvsstovan við einum og einum øki í senn fyri at fáa alt greitt á tí økinum. T.d. hevur Starvsstovan arbeitt við alivinnuni fyri at fáa allan henda vinnutáttin upp á pláss. Hetta er óivað skilagóð tilrættalegging á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Men kunnu vit, sum eitt land sum eina og aleina virkar og útflytur matvørur, góðtaka, at heilsufrøðiligi og veterineri myndugleikin ikki fáa ta játtan, sum er neyðug fyri at halda lógir og reglur og eisini taka sær av tí á hesum øki, sum myndugleikin heldur vera neyðugt? Hetta kunnu vit ikki góðtaka!

HERFYRI lósu vit, at sláturvirkið í Hósvík hevur hall á hvørjum ári, og spurningurin er, hvussu leingi tað heldur fram. Støðan, sum nú er umrødd, kundi verið eitt gott høvi til, at bøndur og landsmyndugleikar bóru so í bandi, at alt neytakjøt, sum endar sum handilsvøra, verður flett upp á løggildaða sláturvirkinum. Hetta kundi t.d. verið ein treyt fyri at fáa kjøtstudningin. Men eitt er neytakjøt. Hvussu við øllum seyðinum, sum ofta verður flettur undir primitivum umstøðum og seldur sum dýr matvøra. Ella havhestinum, sum í hesum døgum verður seldur úr kuldadiskum ella í Vágsbotni. Er hann tikin upp undir nóg reinførum umstøðum? Vit skulu varðveita siðvenju og fólkalív, men matvøra má virkast undir skipaðum umstøðum.

***Sosialurin***

# Norðhavið fult av grind

Norðhavið er fult av grind, men striltið hevur gingist at fáa rakstur á nakran bólk. Týsdagin vóru fleiri bátar á Norðhavinum og royndu at fáa onkran bólkin burturúr og at reka hann móti landi, men uttan úrslit. Tá teir góvust í skýmingini vóru teir ytstu bátarnir 10 fjórðingar úr Rivtanga, norðasti endin á Eysturoynni.

Í gjár var aftur grind at síggja á Norðhavinum og fleiri bátar vóru hjá henni. Tá blaðið fór til prentingar stutt eftir middag í gjár var ikki eydnast at fáa rakstur á hana. Um tað eydnaðist bátunum á fáa rakstur á grindina, so eru næstu hvalvágirnar Klaksvík, Fuglafjørður, Funningsfjørður og á Norðskála.

## Orðaskifti

# Viðmerking

Mangan havi eg hugsað, tá eg spákaði inni í miðbýnum og leyt meg íkring – her hava vit bókahandilin – hetta gamla hugnaliga húsið, sum gevur øllum plássinum ein serligan dám – nú friðað tíbetur. Her hava vit løgtingið – áður líkt ein stórreiðarasethúsum frá tíðini fyri fyrra heimsbardaga, nú, eftir umvæling, dimt á liti og við flatekju – eins og upprunaliga tingstovan frá 1858. Flagtekjan gevur húsinum tyngd og tign og samsvarar við tekjuna á gamla bókahandli. Hevði nú flag eisini verðið lagt á gamla meinigheitshúsið – eitt heldur missiónskspartanskt hús – fekk alt umhvørvið har ein einkenniligan dám.

Hetta er bert nakað, sum rennur einum í huga, tá ein spákar har um Vaglaleiðina.

**Janus Kamban**

# Anniku Gulklett
## til minnis



*»Út úr teim troyttandi, tyngjandi skuggum. Har allar ævir frá stríði vit hvíla«.*

Oman á allar sorgir, man fekk at bera, var hetta størsti smeitur og skelkur í lívinum, sum steinur oman á byrðu.

Hesin sólríki morgun, 24.6., fer neyvan nakrantíð at kámast úr minninum – ein so stórur sorgardagur. Sólin stavar niður, longsti dagur er við at fara aftur um bak og øll eru í góðum hýri – so steðgar alt brádliga upp. Gott at eingin hómar framtíðina, ella hevði man ikki kunnað livað.

Sum Mikkjal segði: »Nú er einki at koma her til, nú Annika ikki er her longur«. Tey vóru systkinabørn, vuksu upp saman javngomul, til Mikkjal flutti niður at búgva.

Sum Annika skrivaði áðrenn sína seinastu ferð: »Hví? Eg havi jú alt«. Men hon væntaði sær ein betri stað enn hendan, og nú spælir Annika á hørpu.

*»Eg velji fyrr Jesus enn alt, ja alt sum verðin bjóða kann«.*

Øll standa spyrjandi, hví? Ófatuligt. Annika hevði ein so stóran vinaskara sum fáur, var umfevnd av øllum, gott heim, góð foreldur og einkarbarn, og egin hús í Havn at búleikast í og kundi gera alt, ið henni lysti. Hon hevði so ómetaliga nógv at fara frá.

*»Eg søkti gleði her og har, men vónleyst oyðið alt tó var«.*

Tað fara at ganga ár at fáa so stóra byrðu at kneykra undan, um tað nakrantíð fer at lætna.

*Tá summar at heystinum líður, tilreiðar seg fuglurin ger.*
*Eitt ljósari land honum bíðar, har summar og sól altíð er.*
*Teir vita, tá vindarnir kólna, at nú nærkast fráferðarstund.*
*Teir vita, tá blómurnar følna, teim væntar ein heitari lund.*
*Ein dag savnast allir í skara og ferðast til fjarskotin lond.*
*Tá heldur ei fella og snara, teir slíta øll bindandi bond.*

»Anga, saknurin er stórur, vit leingjast øll eftir tær.

**Omma**

# Klassiskt fyri suðuroyingar

Í kvøld verður ein konsert við klassiskum tónleiki hildin í skúlanum í Trongisvági. Tað er tann norski messosopranurin Liv Oddveig Midtmageli og danskt-týski pianisturin Ingo Schauser sum spæla. Tey hava spælt norðanfjørðs og eru væl umtikin. Konsertin verður í kvøld klokkan 19.30.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæra kona, mamma, vermamma og omma

**MARY ODNY THOMSEN**
**Norðragøta**

andaðist á Landssjúkrahúsinum 28. august, 57 ára gomul.

Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum hósdagin 31. august kl. 17.00.

Jarðarferðin verður fríggjadagin kl. 14.00 úr Filadelfia, Gøtu.

*Fyri tey avvarðandi*
**Eyðfinnur og børnini við familju**

Tey, ið vilja minnast Mary við blómum ella kransi, kunnu í staðin lata eina gávu til Zarepta, konto í peningastovnunum.

# Tøkk

Øllum tykkum, sum sýndu samkenslu og stuðlaðu okkum í sorg okkara, tá

**JÓAN PETUR THOMSEN**
**Froðba**

so brádliga andaðist og varð jarðaður, takka vit hjartaliga.

*Familjunnar vegna*
**Annlis og dreingirnir**



# Arbeiðaraflokkurin mist oddasessin



*Jens Stoltenberg*

*Fyri fyrstu ferð er Framburðsflokkurin í Noregi vorðin størsti flokkur í landinum*

Tað hevur stutt sagt gingið av skriðuni hjá norska Arbeiðaraflokkinum, síðani flokkurin tók við stjórnarvaldinum. Samstundis hevur tann høgravendi Framburðsflokkurin vunnið sær alt størri og størri undirtøku, og sambært nýggjastu veljarakanningini er hann nú fyri fyrstu ferð vorðin størri enn Arbeiðaraflokkurin og harvið landsins størsti flokkur.

Sambært kanningini hevur Framburðsflokkurin havt eina framgongd upp á 1,6 prosentstig síðani seinastu kanning, og harvið er flokkurin nú komin upp á 24,8 prosent av atkvøðunum, var val til Stórtingið nú.

Tað er tó ikki framgongdin hjá Framburðsflokkinum, sum ger munin, men heldur tann ovurstóra afturgongdin hjá Arbeiðaraflokkinum. Nýggja kanningin gevur flokkinum 22,1 prosentstig, og tað er heili 7,1 prosentstig minni enn í undanfarnu kanningini.

### Gleði og álvarssemi

Formaðurin í Framburðsflokkinum, Carl I. Hagen, er sum vera man sera fegin um ta áhaldandi framgongdina hjá flokkinum, men hann ásannar, at talan kann vera um eitt fyribrigdi, sum ikki nýtist at vera varandi.

Hjá Arbeiðaraflokkinum er støðan rættiliga álvarssom, tí hetta er fyrstu ferð síðani 1927, at flokkurin ikki er størsti politiski flokkur í Noregi. Flokksskrivarin, Solveig Torsvik, viðgongur eisini, at tølini eru sera álvarssom.

Nýggja norska veljarakanningin gevur annars Kristiliga Fólkaflokkinum hjá undanfarna forsætisráðharranum, Kjell Magne Bondevik, 2,9 prosentstig í framgongd, so flokkurin nú hevur 16,4 prosent av atkvøðunum. Harvið er hann farin fram um Høgra, sum eftir nýggju kanningini hevði fingið 14,9 prosent av atkvøðunum, skuldu norðmenn valt nýtt Stórting nú.

# Amerikanskur njósnarakavbátur úr Barentshavinum í dokk

*Seks dagar eftir vanlukkuna við russiska kavbátinum "Kursk" kom amerikanski njósnarakavbáturin "Menphis" til Noregs, har hann alt fyri eitt fór í dokk.*



*Sorgin er stór í Russlandi og enn er ikki greitt, hvør orsøkin var til vanlukkuna*

Júst sum amerikanski kavbáturin kom til Bergen, kunngjørdi russiski verjumálaráðharrin, Igor D. Sergeyev, at "Kursk" eftir øllum at døma var sokkin eftir samanstoyt við ein fremmandan kavbát ella av einari minu frá seinna heimsbardaga.

At amerikanski njósnarakavbáturin fór í dokk í Bergen, setti alt fyri eitt gitingar í gongd, men í verjumálaráðnum Pentagon halda tey uppá, at dokkferðin hjá "Memphis" hevði einki við "Kursk" at gera., og at arbeiðið í Bergen var lagt til rættis langt frammanundan. Amerikanska verjumálaráðið leggur afturat, at hvørki "Memphis" ella nakar annar amerikanskur kavbátur hevur verið í nøkrum samanstoyti.

### Hava upplýsingar

Samstundis váttar Pentagon, at umborð á "Memphis" eru týðandi upplýsingar um tað, sum hendi í Barentshavinum leygardagin 12. august, og at sonarupptøkur hjá kavbátinum ikki benda á, at "Kursk" sakk eftir samanstoyt.

- Vit hava kavbátar, sum hoyra og skráseta alt, sum fer fram, og vit eru rættiliga sannførd um, hvat veruliga hendi, segði ein týðandi embætismaður í amerikanska verjumálaráðnum við blaðið New York Times týsdagin.

Amerikanska frágreiðingin er, at propell-rikin torpedo umborð á "Kursk" gekk av, tá menn skuldu løða hana, soleiðis at rakettmotorurin í torpedoini ella brennievnið sprongdist. Tveir minuttir og 15 sekund seinni, tá skiparin á "Kursk" setti fulla ferð á kjarnorkureaktorin ella slepti barlastini fyri at fáa kavbátin upp í vatnskorpuna, sprongdist sjálv torpedoin, og kavbáturin fekk eitt stórt hol har frammi.

Metingin hjá amerikanska verjumálaráðnum sigur eisini, at teir flestu av teimum 118 monnunum umborð á "Kursk" doyðu beinanvegin av sterku spreingingini.

team 85 · 31 65 11

Shetland Cruise 2000 summarið
www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00

Farið verður av Havnini mánadag og komið verður aftur mikudag



**Gisting á hotelli**
úr einans ... 864,- fyri hvønn (í lágárstíð)



**Gisting á vallaraheimi**
úr einans ... 691,- fyri hvønn (í lágárstíð)



**Privat gisting**
úr einans ... 819,- fyri hvønn (í lágárstíð)

Nógvir handlar hava opið týsdag til kl. 18.30

*Á farstøðini í Lerwick er møguleiki fyri at lata inn viðføri til varðveitslu til fráferðina hjá Norrönu*

*Hvørt týskvøld frá kl. 18.30 - 24.00 verður skipað fyri útferð til m.a. Central Mainland og Scalloway. Vitjað verður á fleiri áhugaverdum støðum har m.a. verður sýnt fram hetlendskt handverk. Eisini er høvi at njóta eina hetlendska máltíð.*



**Ring og hoyr nærri !**

e-mail: booking@smyril-line.fo